# Listastevnan stríðist fyri lívinum

**Norðurlandahúsið smekkar kassan aftur og noktar at brúka eina stóra millióna upphædd til Listastevnu Føroya frameftir. Stjórin Niels Halm heldur, at Norðurlandahúsið hevur brúkt ov stóran part av sínum pengum til Listastevnuna, og hann vil hava onnur upp í tiltakið, so at Norðurlandahúsið ikki einsamalt stendur við endan. Avleiðingin av hesum kann verða, at Listastevnan ikki verður hildin aftur**



*Norðurlandahúsið stílaði høgt við Listastevnuni, men nú stevnan hevur verið hildin í fimm ár, vil Norðurlandahúsið sleppa undan eini krevjandi fíggjarligari ábyrgd fyri Listastevnuni, sum seinastu tvey árini hevur kostað húsinum umleið tríggjar milliónir krónur. Avleiðingin kann í ringasta føri verða, at Listastevnan ikki verður hildin aftur*

LISTASTEVNA
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Norðurlandahúsið vil ikki longur einsamalt hava fíggjarligu ábyrgdina av Listastevnu Føroya, og stýrið fyri Norðurlandahúsið hevur boðað stýrinum fyri Listastevnuni frá hesum.

Tí verður Listastevnan ikki hildin aftur á sama hátt, sum hon hevur verið hildin síðani 2001, og ógvusligasta avleiðingin av avgerðini hjá Norðurlandahúsinum kann verða, at Listastevnan als ikki verður hildin aftur.

– Listastevnan hevur kostað ov nógvar pengar, og Norðurlandahúsið hevur brúkt ov stóran part av sínum pengum til hetta einstaka tiltak, sum fer fram í einum stuttum tíðarskeiði um summarið, tá ið annars eina rúgva av øðrum tiltøkum eru í landinum, sigur Niels Halm, stjóri í Norðurlandahúsinum.

– Stýrið fyri Norðurlandahúsið hevur tí gjørt av, at vit vilja ikki brúka eina stóra millióna upphædd upp á Listastevnuna frameftir. Vit vilja gjarna verða við at skipa fyri eini listastevnu, men vit vilja ikki verða einasmøll um at hava fíggjarliga ábyrgd av tiltakinum, sigur hann.

## Onnur mugu koma uppí

Norðurlandahúsið hevur í ár brúkt 1,1 milliónir krónur til Listastevnu Føroya – í fjør var upphæddin 1,9 milliónir – og tað er hendan upphædd, sum Norðurlandahúsið vil hava at ráða yvir til onnur tiltøk, sum kunnu verða hildin alt árið runt.

– Vit hava okkara tiltøk innandura, og tí er tað neyvan optimalt, at vit brúka so nógva orku og pengar mitt á summarinum, tá ið fólk annars hava nógv at fara til uttandura. Heldur eiga vit at brúka Norðurlandahúsið meira til tiltøk í tí myrku tíðini, sigur Nielsn Halm.

Stjórin í Norðurlandahúsinum vil ikki gera nakra endaliga niðurstøðu um framtíðina hjá Listastevnuni, hóast hon kann tykjast ivasom, um Norðurlandahúsið bakkar nøkur fet út úr stevnuni.

– Tað er eingin endalig avgerð tikin um Listastevnuna. Nú fer stýrið fyri Listastevnuna at viðgera støðuna, og vit fara at royna at finna eina nýggja skipan, har Norðurlandahúsið verður ein av viðspælarunum, sigur hann.

*Men verður tað gjørligt at fáa onnur inn at gjalda kostnaðin fyri Listastevnuna?*

– Hetta eru nógvir pengar hjá einum nýggjum aktøri at taka á seg, og møguliga kann ein heilt nýggj skipan gerast fyri Listastevnuna. Norðurlandahúsið hevur so gjørt greitt, at húsið vil ikki einsamalt hava fíggjarliga ábyrgd av Listastevnuni. Vit smekka ikki við hurðini, tí vit vilja framvegis verða við, men tað skal verða saman við øðrum, sum eisini vilja taka ábyrgd.

## Norðurlandahúsið bakkar

Tað var meðan Helga Hjørvar var stjóri í Norðurlandahúsinum, at Listastevnan gjørdist veruleiki. Nógv hevur verið gjørt burtur úr stevnuni, og kend listarfólk hava vitjað á Listastevnuni. Endamálið við Listastevnuni var at geva føroyingum eitt mentanarligt tilboð, sum fólk annars ikki kundu fáa í Føroyum.

Síðani Niels Halm gjørdist stjóri í Norðurlandahúsinum hevur hann lagt upp til, at Listastevnan skuldi endurskoðast. Hann hevur sett spurnartekin við, um Listastevnan liggur røttu tíðina á árinum, og um Norðurlandahúsið skal brúkast so stóra upphædd til stevnuna á hvørjum ári.

Tiltakið skuldi eftirmetast, nú stevnan hevið verið hildin í fimm ár, og úrslitið av hesum er, at Norðurlandahúsið vil hava ein nýggan leiklut í Listastevnuni.

Spurningurin er so, um Listastevnan kann yvirliva uttan sterka Norðurlandahúsið sum fíggjarliga og mentanarliga drívmegi í tiltakinum, men tað skal næsta tíðin vísa.

– Stýrið fyri Listastevnuna hevur ikki vilja gjørt nakra fráboðan um støðuna, tí hon er so óviss í løtuni. Vit standa mitt í eini prosess, og enn vita vit ikki, hvussu tað verður við Listastevnuni næsta ár og í komandi árum, sigur Niels Halm.

## Mentamálaráðið upp í leikin

Kartni Ravnsfjall er umboð hjá einum øðrum týðandi viðspælara í Listastevnuni, nevniliga Tórshavnar kommunu, og gongur alt sum vanligt, skal hann verða formaður fyri næstu Listastevnu.

Hann staðfestir, at tað er ein álvarsom støða, sum Listastevnan er komin í, nú Norðurlandahúsið ikki longur vil standa við fíggjarligari ábyrgd.

– Vit vóna, at Listastevnan kann halda fram, tí hon hevur týdning fyri føroyskt mentarlív. Listastevnan bjóðar eitt mentanligt tilboð, sum ikki fæst aðrastaðni, og eisini føroyskt mentanarlív fær nógv burturúr. Eitt hugskot kundi kanska verið at hildið hana annaðhvørt ár, sigur Kartni Ravnsfjall.

– Men nú standa vit í eini bíðistøðu, eftir at Norðurlandahúsið er komið við sínari fráboðan. Vit ætla nú fáa ein fund í lag við Mentamálaráðið um støðuna. Mentamálaráðið kundi stuðla Listastevnuni við meira pengum, og vit mugu eisini spyrja okkum sjálvi, um vit vilja hava eitt slíkt tilboð ella ikki her í Føroyum, sigur hann.

## FAKTA

Listastevna Føroya hevur verið hildin á hvørjum ári síðani 2001.

Norðurlandahúsið og Tórshavnar kommuna skiftast um at hava formannin fyri stýrið, og annars er føroysk list í breiðari merking við í umboðsráðnum fyri Listastevnuna

**Listastevnustýrið**
Niels Halm, formaður
Kartni Ravnsfjall, næstformaður
Jenny Petersen
Carl Jóhan Jensen

**Umboðsráð**
LISA, Felagið Føroysk Tónaskøld, Felagið føroysk Myndlistafólk, Leikarafelag Føroya, Leikpallur Føroya, Føroya Blaðmannafelag, Rithøvundafelag Føroya, Arkitektafelag Føroya, Kórsamband Føroya, Føroya Tónleikarafelag, Føroyskir Yrkisfotografar, Dansifelagið Sláið Ring, Listasavn Føroya, Føroya Symfoniorkestur, Føroya Fornminnissavn, Føroya Landsbókasavn, Fróðskaparsetur Føroya, Stýrið fyri Norðurlandahúsið, Tórshavnar Býráð og Mentamálaráðið

HVÍTVØRUR
damor



Blomberg vaskimaskina
- 1600 snúðningar sentrifuga
- Tekur 6 kg
- Orkuflokkur A+
- AAA maskina
- Elektronisk stýring
- Resttíðsvísari
Fyrr 7.298,-
nú 5.998,-



Beko FRN1970 frystiskáp
- 85 cm hædd
- Superlágorka
nú 1.998,-



LG dustsúgvari
- 1400 watt
- Teleskoprør
- Lættur at bera
nú 598,-



Bosch SKT5102 borð-uppvaskimaskina
- 6 persónar
- Vaskiflokkur A
- Rustfrítt Stál innan
- Fjalt hitalikam
- AAB maskina
- H450xB555xD460 mm
einans 3.998,-

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001
damor